FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Mannagongd fyri lestrarráðsvali á Fróðskaparsetri Føroya

*Vísandi til "Reglugerð fyri lestrarráð á Fróðskaparsetri Føroya", góðkend av Stýrinum 22. februar 2024 og við gildiskomu 1. mars 2024, ásetur rektarin hesa mannagongd um praktisku avgreiðsluna av lestrarráðsvali á Setrinum sambært nevndu reglugerð:*

## Lestrarráðsval

Rektarin á Setrinum skipar fyri vali, tá nýtt lestrarráð skal veljast, ella tá einstakir limir standa fyri vali til lestrarráð. Viðv. tal av ráðslimum, varalimum og valskeiði verður víst til omanfyri nevndu reglugerð fyri lestrarráð.

## Valnevnd

Rektarin setur valnevnd við hóskandi tali og umboðan at skipa fyri vali av ávikavist vísindastarvsfólki og lesandi í avvarðandi lestrarráð. Ráð teirra lesandi (RTL) skal vera umboðað í valnevndini.

## Valbæri og valrættur

Valnevndin ger yvirlit yvir tey, sum samsvarandi ásetingunum í omanfyri nevndi reglugerð fyri lestrarráð hava ávikavist valbari og valrætt til lestrarráðsval á Setrinum.

## Kunning um lestrarráðsval

Valnevndin tryggjar við nøktandi kunningarátøkum m.a. á heimasíðu Setursins og úti á deildunum, at øll starvsfólk og lesandi á Setrinum, sum eru valbær og hava valrætt, verða kunnað um:

- hvat/hvørji lestrarráð veljast skal til
- hvussu nógvir limir og varalimir skulu veljast í einstøku lestrarráðini
- møguleikan at stilla upp sum valevni til lestrarráð
- møguleikan at atkvøða til avvarðandi lestrarráðsval
- nær, hvar og hvussu valið fer fram

## Uppstillingartíðarskeiðið

Tey, sum ynskja at stilla upp til lestrarráð, skulu skrivliga vátta hetta fyri valnevndini innanfyri eitt av valnevndini ásett 2 vikurs uppstillingartíðarskeið áðrenn sjálvt valtíðarskeiðið byrjar. Valnevndin ásetur og kunnar um, hvussu nevnda uppstillingarváttan skal gevast.

## Vallistin

Tá uppstillingartíðarskeiðið er farið, ger valnevndin ein vallista við ávikavist vísindastarvsfólkum og lesandi sum bjóða seg fram sum valevni til avvarðandi lestrarráð á Setrinum.

Valnevndin syrgir fyri, at endaligi vallistin á nøktandi verður kunngjørdur fyri teimum sum hava valrætt.

## Valtíðarskeiðið

Valnevndin ásetur eitt 2 vikurs tíðarskeið, har veljast kann til lestrarráð. Byrjanin av valtíðarskeiðnum skal liggja minst 3 yrkadagar eftir at omanfyri nevnda uppstillingartíðarskeið er runnið.

## Atkvøðugreiðslan

Valnevndin fyrireikar atkvøðugreiðsluna, sum verður skipað talgilt. Tryggjast skal, at sjálv atkvøðugreiðslan kann fara fram loyniliga.

## Friðarval

Um talið av valevnum til einstaka lestrarráðið ikki er hægri enn talið av ávikavist ráðslimum og varalimum, sum standa fyri vali til einstaka lestrarráðið, verða tey uppstillaðu vald í avvarðandi lestraráð uttan atkvøðugreiðslu.

## Uppteljing og valúrslit

Er valið farin fram við atkvøðugreiðslu, telur valnevndin - tá valtíðarskeiðið er runnið - skjótast gjørligt atkvøðurnar upp og á nøktandi hátt kunnger valúrslitið fyri leiðslu, starvsfólkum og lesandi á Setrinum. Á sama hátt skal kunnast um valúrslitið, um valið er farið fram sum friðarval uttan atkvøðugreiðslu.

Er valið farið fram við atkvøðugreiðslu, er tann/tey við flest atkvøðunum í raðfylgju vald í einstaka lestrarráði samsvarandi talinum av ráðslimum sum skulu veljast í avvarðandi lestrarráð. Stendur á jøvnum í atkvøðum, verður valið teirra millum avgjørt við lutakasti. Tey, ið ikki vinna sær sess sum ráðslimir, verða varalimir fyri ávikavist vísindastarvsfólk og lesandi í ráðnum.

## Varafólkaskipan og nýval

Um ráðslimur av einhvørjari orsøk fer úr lestrarráðnum í úrtíð, kemur næstvaldi - ella avtalaði varalimurin um friðarval hevur verið - eftir raðfylgju á listanum hjá ávikavist vísindastarvsfólki og lesandi til seinasta val inn sum limur í avvarðandi lestrarráð. Um ongin varalimur er tøkur, verður skipað fyri vali av nýggjum ráðslimi og varalimum, tó soleiðis, at um tað er styttri enn 3 mánaðir til næsta regluliga val, so verður nýggjur ráðslimur og varalimir ikki valdir fyrr enn á regluliga valinum. Hetta er tó ikki galdandi, um formaður/forkvinna fer úr ráðnum í úrtíð, og ongin av hinum ráðslimunum ynskir at yvirtaka formanssessin, ella um ráðið missir sítt viðtøkufýri, tí fleiri ráðslimir samstundis fara úr ráðnum í úrtíð; í so fall skal beinanvegin skipast fyri vali av nýggjum formanni/forkvinnu ella ráðslimum, fyri at lestrarráðið framhaldandi kann vera viðtøkuført.

------------------------------------------